

# HALLÓ



## *Steintór Rasmussen*
tónleikari og sangskrivari

**Steintór, tú skalt luttaka við eina konsert í Løkshøll fríggjakvøldið í næstu viku, í sambandi við Mentanarstevnuna í Runavík. Hvat fara tit at framføra?**
- Hetta verður ein serstøk konsert, tí her verða bæði sangir hjá Frændum, Millum Frændur og mær sjálvum at hoyra. Ætlanin er at gera nógv burturúr, tá vit fara at framføra bæði nýggjar og teir góðu gomlu sangirnar. Og eg veit, at Jógvan Hansen er sera spentur eftir at sleppa á pall her í Runavík.

**Hetta verður ein sitikonsert. Hvørji krøv setur tað til tykkum sum tónleikarar?**
- Tað er sjálvandi munur á at spæla á eini slíkari konsert ella at spæla til dans. Vit fara at stilla við sterkastu manning, har vit fáa eitt gott høvi at fara aftur um sangirnar og fortelja søgur í samband teir, soleiðis at fólk fáa eina heildarupplivilng. Hinvegin so vita vit, at hetta er eitt gott kvøld til konsertir, og tí fara vit at geva alt hetta kvøldið.

**Hetta er fyrstu ferð, tit framføra í nýggja konserthølinum í Runavík. Hvat veitst tú um Løkshøll?**
- Eg havi bara hoyrt um Løkshøll. Tað, eg havi hoyrt, sigur mær, at her burdu verið allir møguleikar fyri at fáa eitt gott ljóð, og her eiga tí eisini at vera góðir møguleikar fyri at skapa hentan fangandi kulissur. Heilt erliga, eri eg ikki sørt spentur at framføra her. Tað krevur nevniliga eitt sindur, tá ein skal framføra soleiðis fyri einum blandaðum og breiðum áhoyraraskara til eina sitikonsert. Men eg gleði meg til konsertina.

*snorri@sosialurin.fo*

# Uttan ríki




Politikkurin hjá formanninum er um at forkoma Fólkaflokkinum

## Í MORGIN




Hvassur vindur ella skrið av útnyrðingi, seinnapartin minkar hann vindin niður í andøvsgul. Kavæælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 1 og 4 stig.

## FRÍGGJADAGIN




Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin snarar hann í landnyrðing. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 3 og 6 stig.

## LEYGARDAGIN




Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og norði og sólglottar, men kanska okkurt kavæælið. Hitin millum 2 og 6 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 984 hPa. við Jan Mayen fer spakuliga suðureftir. Eitt hátrýst, 1029 hPa. yvir Atlantshavinum viknar nakað.



**Komandi nátt:**
Lágtrýstið eystan fyri Jan Mayen fer í landsynning og gevur vaksandi høgættavind á okkara leiðum.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 94 mm



**Petur Skeel Jacobsen**
greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

14. okt Fyrra kvarter
18. okt Mánin longst frá jørðini
23. okt Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. okt. | 05:28 | 17:46 | 04:28 | 16:46 | 04:43 | 17:01 | 07:28 | 19:46 | 08:28 | 20:46 | 03:43 | 16:01 | 02:43 | 15:01 | 05:43 | 18:01 | 06:43 | 19:01 | 05:13 | 17:31 | 06:28 | 18:46 |
| 21. okt. | 06:04 | 18:20 | 05:04 | 17:20 | 05:19 | 17:35 | 08:04 | 20:20 | 09:04 | 21:20 | 04:19 | 16:35 | 03:19 | 15:35 | 06:19 | 18:35 | 07:19 | 19:35 | 05:49 | 18:05 | 07:04 | 19:20 |
| 22. okt. | 06:36 | 18:56 | 05:36 | 17:56 | 05:51 | 18:11 | 08:36 | 20:56 | 09:36 | 21:56 | 04:51 | 17:11 | 03:51 | 16:11 | 06:51 | 19:11 | 07:51 | 20:11 | 06:21 | 18:41 | 07:36 | 19:56 |
| 23. okt. | 07:16 | 19:36 | 06:16 | 18:36 | 06:31 | 18:51 | 09:16 | 21:36 | 10:16 | 22:36 | 05:31 | 17:51 | 04:31 | 16:51 | 07:31 | 19:51 | 08:31 | 20:51 | 07:01 | 19:21 | 08:16 | 20:36 |
| 24. okt. | 07:57 | 20:19 | 06:57 | 19:19 | 07:12 | 19:34 | 09:57 | 22:19 | 10:57 | 23:19 | 06:12 | 18:34 | 05:12 | 17:34 | 08:12 | 20:34 | 09:12 | 21:34 | 07:42 | 20:04 | 08:57 | 21:19 |